ítróttur

Nr. 232 • fríggjadagur • 1. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Torført at seta naka› mál

Li›skiparin á føroyska kvinnulandsli›num, Jórun Ludvig, dugir illa at siga, hvussu vónirnar eru undan fyrsta dystinum móti Svøríki

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Einnki er at ivast í, at føroysku hondbóltsgenturnar eru spentar, nú ta› av álvara stundar til stóru uppgávuna, sum leingi hevur ligi› fyri framman. Landsdysturin móti Svøríki er fyrsti dystur hjá kvinnunum í f‡ra ár, og harumframt tykist hetta eisini vera byrjanin til eitt n‡tt tí›arskei› í føroyskum kvinnuhondbólti.

Spenningurin er stórur

Hósmorgunin hittu vit li›skiparan á føroyska li›num, Jórun Ludvig, á máli, og hon duldi heldur ikki fyri, at spenningurin var stórur hjá teimum.

– Sjálvandi eru vit spentar. Seinastu tí›ina hava vit nærum ikki hugsa› um anna›, so ta› næstan solei›is, at mann hevur mist svøvnin.

Spenningurin er uttan iva eisini tengdur at, at alt hetta er so at siga ókent hjá leikarunum, og Jórun ásannar eisini, at tær illa duga at siga, hvar tær flóta. Í øllum førum er torført at fáa naka› beinlei›is svar, tá vit spyrja, hvørjar vónirnar eru til dystirnar.

– Hatta er ein spurningur, sum sera torført er at siga naka› um. Á venjingarleguni um vikuskifti› tosa›u vit nógv saman um hetta, men naka› veruligt mál um úrslit hava vit als ikki sett okkum.

– Hóast Sophus hevur sæ› Svøríki spæla fleiri dystir, so kenna vit, sum skulu spæla, ógvuliga líti› til li›i›. Vit vita sjálvandi, at Åse Erikson er framúr, og einki er heldur at ivast í, at hinar á li›num eisini eru væl betri enn vit, um rokna› ver›ur leikara fyri leikara. Sostatt hava vit ikki ánilsi fyri, um vit skulu seta okkum sum mál at tapa vi› minni enn 30 málum, ella um vit skulu vinna vi› tveimum.

– Tá vit hava spælt dystin friggjadagin, duga vit helst betri at siga, hvar vit liggja í mun til mótstø›una, og so kunnu vit n‡ta leygardagin til at seta okkum eitt meira nágreinuligt mál til seinna dystin.

Fara at strí›ast

Hava tær ikki naka› greitt mál vi› úrslitinum, so er hugbur›urin undan dystinum tó púrasta grei›ur sambært li›skiparanum.

– Vit fara allar inn fyri at strí›ast. Vit eru samdar um, at líka miki› hvussu víkir og vendir a vøllinum, so skulu allar geva seg fult út alla tí›ina. Eisini um vit koma aftur um vi› nógvum málum.

Jórun vísir í hesum sambandi á, at hon saman vi› ø›rum á landsli›num hevur roynt, hvussu stór yvirmaktin kann ver›a, tá talan er um altjó›a hondbólt.

– Vi› ungdómslandsli›num taptu vit ta einu fer›ina 40-10 fyri Danmark, og ta› var alt anna› enn stuttligt. Eisini tí, at vit undan dystinum settu okkum sum mál at vinna, og tá vit so komu langt afturum, fullu vit fullkomuliga í fátt.

Hetta er so avgjørt ikki naka›, sum tær ætla skal henda í kvøld, og Jórun sigur eisini, at tær lærdu naka› av taptinum, sum teimum tá var fyri.

– Tá man hevur roynt slíkt eina fer›, so lærir man sjálvandi av tí. Ári› eftir vóru vit aftur í kapping móti danska landsli›num, og ta› fer›ina var hugbur›ur okkara heilt ø›rvísi. Hetta sást eisini aftur í úrslitinum, tí seinnu fer›ina var tapi› 15 mál.

Ta›, sum hon serliga vísir á vi› hesum, er, at ta› er altavgerandi, at li›i› strí›is til ta› seinasta.

Hósmorgunin var Jórun Ludvig sum vanligt til arbei›is, men frá fríggjamrginum til sunnukvøldi› fer bert landsli›i› at standa á skrá hennara

Mynd: Jens Kr. Vang

– Hóast ta› gongur av skri›uni, so skulu vit ikki vera illa vi› av at vera á vøllinum. Heldur eiga vit alla tí›ina at stu›la upp undir hvørja a›ra og standa saman. Geva vit upp, kunnu vit í øllum førum ikki rokna vi› nøkrum sum helst.

Savna›ar alt vikuskifti ›

Fríggjamorgunin kl. 9.00 savnast landsli›i› til venjingar í Gundadalshøllini, og sí›ani ver›a tær saman til eftir dystin sunnudagin.

Tí›liga seinrapartin gongur lei›in til Klaksvíkar, og millum dystirnar, fara tær allar at búleikast á Hotel Føroyum.

Jórun heldur so avgjørt, at hetta er ein fyrimunur fyri tær, so á tann hátt kann orka n‡tast til at hugsa um dystirnar móti Svøríki.

– Vit royndu at skipa solei›is fyri, at vit kundu savnast longu hóskvøldi›, men hetta lat seg ikki gera av praktiskum ávum, sigur hon.

Eftir er so bert at takka li›skiparanum fyri samrø›una, men á›renn hetta ver›ur gjørt, skulu vit sjálvandi eisini ynskja kvinnunum gó›a eydnu til dystirnar bá›ar. Tveir dystir, sum kunnu gerast strævnir, men sum so avgjørt eisini eiga at gera sitt til, at lyfta hondbóltin her á landi.

Stø›an 1. Deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	9	9	-	0	-	0	303	218	85	18
2	StÍF	10	6	-	1	-	3	301	263	38	13
3	Kyndil	9	4	-	2	-	3	259	229	30	10
4	H71	9	4	-	0	-	5	241	254	-13	8
5	Neistin	9	4	-	0	-	5	213	229	-16	8
6	Tjaldur	10	3	-	0	-	7	228	300	-72	6
7	KÍF	10	1	-	1	-	8	219	271	-52	3

Neytamykjukapping

Kyndil hevur l‡st vi› neytamykjukapping leygardagin 2/12-00 kl. 12:00 á vøllinum á Læraraskúlanum. Vegna ymsar orsøkir ver›a vit noydd at flyta tiltaki› til næsta vikuskifti, sama sta› og somu tí› - t.v.s. 09/12-00. kl. 12:00 dagin fyri klassikaran, Kyndil - VÍF, I kv/menn, i› ver›ur 10/12-00 kl.

Tarvurin er ein 2 ára vistfrø›uligur tarvur av Skúvoy og vinnarin skal ikki ómakasær anna› enn at hava nokk av frystiplássi.

Kyndil slaktar, partera og vakumpakkar døgver›anar um vinnarin ynskjur ta›. Lutir kunnu keypast á tlf.: 211702 (Hanus Kúrberg).

Flytingar

Orsaka› av kvinnulandsdystinum eru tveir dystir, sum annars skuldu veri› leiktir sunnudagin, fluttir.

Neistin-Kyndil ver›ur fluttur til komandi mikudag, og dysturin, VÍF-Tjaldur, ver›ur fluttur til mikudagin, 13. desember.

Kyndil-H71 26-27 (14-13)

H71 blandar seg upp í toppin

Sigursgongdin hjá Kyndli fekk ein brá›an enda, tá teir mikukvøldi› hittu H71. Í einum sera tættum dysti tryggja›u hoyvíkingar sær øll stigini í allar seinastu sekundunum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Seinastu vikurnar hevur talan nærum veri› um eina endurreisn av Kyndli.

Sigursvanda havnarli›i› hevur ikki veri› meistari í bestu mansdeildini sí›ani 1995, men stø›ugt gó› avrik tríggjar vikur upp í slag høvdu kanska givi› ásko›arunum vónina um, at nú skuldi ta› ver›a aftur.

Í øllum førum mundu tey rokna vi›, at li› teirra nú av álvara fór at taka upp kappingina vi› VÍF, og undir ongum umstø›um mundu tey rokna vi›, at H71 skuldi fara at ste›ga teimum.

Jónleif úr spælinum

Fyrstu løtuna av dystinum mikukvøldi› var heldur ikki líkt til, at ta› skuldi ganga, sum ta› gekk.

Ikki tí. Hoyvíkingar høvdu avgjørt onkrar ætlanir vi› dystinum. Milum anna› fóru teir frá fyrsta bríksli› út at mansverja Jónleif Sólsker, solei›is at Kyndil ikki skuldi fáa gli› á spæli›.

Partvíst eydna›ist hetta eisini, tí Kyndil fekk ikki vanliga kvika álopsspæli› at koyra. Vi› fimm móti fimm gjørdist ta› tó lættari hjá Kyndli at spæla verjuna tunna, og hetta dugdu teir fleiri fer› at gera sær dælt av.

»Armar, armar« hoydi tú fleiri fer› Sverra Jacobsen rópa av venjingarbeinkinum, men ikki fyrr enn hann hev›i toga› spælarar sínar út til eitt Time-out, tóktust teir at skilja hetta.

Stø›an var tá 6-2 til Kyndil, men eftir hetta fingu hoyvíkingar brádliga betri tak á. Teir tóktust ágr‡tnari í verjupartinum, og eisini í álopinum byrja›i at gangast betri. Álopsspæli› gekk kanska ikki so skjótt, og var kanska eisini einstátta›, tí Halgir var nærum einsamallum um at hótta, men eina av fremstu dygdunum duga teir. So at siga øll álop ver›a avsluttª›, og hetta merkir aftur, at ta› sjáldan eydnast mótstø›uli›num at fáa gongd á naka› veruligt kontraspæl. Naka› sum annars hevur eydnast væl hjá Kyndli seinastu dystirnar.

Sverri átti ein trumf

Seiastu fimm minuttirnar undan ste›ginum fekk H71 minka› lei›sluna ni›ur í eitt mál, og so var linjan líka sum løgt til seinna hálvleik. Ongan tí› vóru meira enn tvey mál á muni, og hetta vi›førdi, at spenningurin alla tí›ina var í hásætinum.

Í eini roynd at ste›ga hoyvíkingunum, gjørdi Kyndil nú av at mansverja Halgir, sum átti bró›urpartin av hoyvíksmálunum í fyrra hálvleiki. Kanska høvdu hoyvíkingar rokna› vi› hesum, kanska ikki. Í øllum førum áttu teir eitt effektivt mótvápn ímóti hesum.

Stefan Dorofte hevur veri› skaddur stóran part av árinum, men hesu fer› sást hann sita á beinkinum. Nú Halgir var› mansvardur, gjørdi Sverri av at n‡ta rumenan í álopspartinum, og hóast hann enn er sjónligla darva›ur av ska›anum, so eru hondbóltsevnini tó ey›s‡nd.

Harumframt gjørdi Sverri nú brádliga av at mansverja Bjarna Wardum, heldur enn Jónleif Sólsker, og hetta skapti aftur naka› av órógv, fram til Jónleif aftur hev›i funni› stevi›, og skifti hoyvíkingar aftur mansverju, so ta› enn eina fer› var› Jónleif.

Nógv stó› á

Tá fari› var› um mi›juna av hálvleikinum eydna›ist brádliga hoyvíkingum at leggja seg á odda fyri fyrstu fer› í dystinum, og nú stó› av álvara nógv á hjá Kyndli.

Eisini tí Egin Høgnesen í seinna hálvleiki stó› sera væl, og fleiri fer›ir megna›i at ste›ga kyndilsleikarum í gó›ari skotstø›u. Millum anna› tók hann eitt brotskast frá Jónleif, stutt undan hoyvíkingar tóku lei›sluna, og naka› seinna framdi hann enn eina avgerandi brotskastsbjarging.

Hetta var tá Bjarni í næst seinasta minuttinum hev›i møguleikan at javna til 26-26. Royndin úr sjey metrum miseydna›ist, og tá Bjarni í sekundunum eftir hetta fekk tveir minuttir, tóktist sigurin at vera H71 vísur. Eisini tí Kyndil vi› hesum noyddist at sleppa mansverjuni, har teir nú royndu at ste›ga bæ›i Halgiri og Dorofte.

Møguliga gjørdist tr‡sti› ov stórt hjá hoyvíkingum, men ta› var undrunarvert, at ta› var royndi rumenski leikarin, sum mundi kosta› teimum sigurin. Fyrst framdi hann álopsfeil, tá hoyvíkingar vóru í yvirtali, og tá Kyndil so fór í álop, fekk hann eina óney›uga útvísing fyri at renna Una um koll.

Tá Kyndil í seinna hálvleiki fór at mansverja Halgir, n‡tti H71 trumfin hjá sær, Stefan Dorofte

Mynd: Álvur Haraldsen

Ta› eydna›ist Kyndli at vinna seg upp aftur á javnt, men tá tvey sekund resta›u í, kom avgerandi løtan.

Fyrst átti H71 tríggja metra kast, har tey flestu helst rokna›u vi›, at teir fóru at stilla upp til skot. Hetta var› tó av ongum, og ísta›in enda›i alt vi›, at Halgir gjørdist somiki› leysur, at Hans Áki sá seg noyddan at taka hann. Brotskasti› setti Halgir trygt í neti›, og so kundu hoyvíkingar fegnast um, at ta› endiliga aftur hev›i eydnast teimum at vinna eina grannauppger›.

Kyndilsleikararnir vóru sjálvsagt vónbrotnir, men i›ranin kundi helst veri› størri, tí satt at siga, so mundi Hans Áki vera heppin, at hann ikki fekk rey›a korti› fyri mótmæli síni móti seinasta brotskastinum til H71.

Strí› um hei›ursmerki

Fyri Hoyvíkingar mundi ta› vera eitt stórt framtak fyri sjálvsáliti›, at teir nú eisini hava knógva› grønu grannunum. Teir eru av álvara farnir at blanda seg upp í strí›i› um hei›ursmerki, og frambur›urin sæst bæ›i í spælinum og ikki minst í hugbur›inum.

Eisini man ta› kennast hugaligt, at teir nú hava fingi› Stefan Dorofte aftur á li›i›. Fyrstu dystirnar tóktist annars, sum um hann hev›i ilt vi› at fella inn í spæli› hjá hoyvíkingum, men mikukvøldi› s‡ndi hann, at hondbóltsevnini eru avbera gó›. At ein hálvskaddur kenlari megnar at skjóta átta mál í einum hálvleiki er í øllum førum ikki gerandiskostur.

Fyri Kyndil mundi tapi› hinvegin kennast sum eitt bakkast av teimum stóru. Spurningurin er so, hvørt teir megna at fáa gli› á aftur beinan vegin

Dysturin í tølum

Málskjúttar:

Kyndil: Bjarni Wardum 8 (1), Rúni Poulsen 3, Uni Wardum 3, Regin Petersen 3, Høgni Klein 3(1), Janus Einar Sørensen 1, Jónleif Sólsker 1, Hans Áki Dal-Christiansen 1

H71: Halgir Dahl Olesen 11(1), Stefan Dorofte 8(1), Johnny Durhuus 2, Rolf Mouritsen 2, Hallur Danielsen 2(2), Anfinn N. Debess 2

Brotskøst: Kyndil 5, H71 7

Útvísingar: Kyndil 7, H71 3

Diskvalifikatiónir: H71 (beinlei›is reytt til leikara á beinkinum)

Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Hildu eins og vanligt eina har›a linju, og hóast mótmælini vi›hvørt vóru heldur har›lig, tá stø›an var spent, lótu teir seg ikki ávirka.

Tjaldur-Neisitn 23-25 (11-17)

Neistin fekk gli› á

Neistin tykist nú vera á veg úr aldudalinum, sum teir hava veri› í. Sigurin mikukvøldi› var hin fyrsti í ein mána›

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Spenningurin var stórur í Runavíkini undan dystinum millum Tjaldur og Neistan.

Me›an ta› hevur gingi› av skri›uni til hjá Neistanum, hevur Tjaldur veruliga fingi› fer› á í seinastuni, og tí vóru helst mong, sum vóna›u, at li›i› eisini fór at knógva føroyameistarunum.

Tey fingu tó sum frammaná, tá dysturin byrja›i, tí Neistin leg›i fyri sum eitt óløgi›. Seinni í dystinum fekk Tjaldur tó samband aftur vi› teir, men nærri enn einum máli komu teir tó ongantí›.

Vóru uppsettir

Jákup Sverri Kass, sum hesu fer› var toppskjútti hjá Neistanum, seg›i eftir dystin, at nú rokna›i hann vi›, at skeiva gongdin var vend.

– Ta› er heilt klárt, at moralurin á li›num hevur betri sí›stu tí›ina. Hetta hevur eisini veri› at sæ› aftur undir venjing, og ta› gevur so eisini úrslit í dysti, sigur Jákup Sverri.

– Trupulleikin hjá okkum hevur eisini veri›, at vit ikki hava duga at takla ni›urtúrin, sum vit hava havt í ár. Kanska tí ta› í fjør gekst okkum so væl.

– Vit hava jú mist fleiri berandi spælarar, og í kvøld var Kári heldur ikki vi› (borti› fingurin), so nú ráddi um at taka ábyrgd, sigur løgtingsma›urin.

– Hesu fer› vóru vit veruliga uppsettir til dystin. Taktikkfundur var longu í gjár, og ta› kendist alla tí›ina, sum um allir leikararnir veruliga fóru á vøllin fyri at vinna.

Ungt li›

Annars fegna›ist Jákup Sverri serliga um, at ta› var vi› einum somiki› ungum li›i, at Neistin hev›i reist seg mikuvøldi›.

Ver›ur sæ› burtur frá teimum bá›um, Jacob og Lars, so var elsti ma›ur á li›num Jákup Sverri sjálvur, og vi› sínum 23 árum, kann hann ikki roknast sum nakar gamal spælari.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:

Tjaldur: Sverri Justinussen 8, Zoran Sarchevic 8(2), Svein í Hei›unum 3, Mortan Hansen 2, Ken Bærendsen 1, Áki Hansen 1

Neistin: Jákup Sverri Kass 6(4), Ári Rouch 5, Ræni Slættanes 4, Jakob Jónsson 3, Ragnar Zachariassen 3, Áki mørk 3, Helgi Justinusen 1

Brotskøst: Tjaldur 2, Neistin 4

Útvísingar: Tjaldur 3, Neistin 4

Dómarar úr H71: Kristian Martin Skála og Petur S. Dahl